## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av norði, seinni av ymsum ættum og møguliga regn av og á. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt, men seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind og regn. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Strúkur í vindi av eystri, seinni gul av landnyrðingi. Okkurt ælið, men eisini sólglottar og hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landsynningi og regn av og á. Hitin millum 9 og 13 stig.



*Byrjað varð fríggjamorgunin við felags upphiting á fótbóltsvøllinum*
***Mynd: Edvard Joensen***

# Fótbóltsskúli

**Árligu fótbóltsskúlarnir hjá Fótbóltssambandinum eru nú byrjaðir aftur. Tann fyrsti í ár var í Sandavági, har umleið 90 børn luttóku**

FÓTBÓLTSSKÚLI
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Skipað varð triðja árið á rað fyri fótbóltsskúla í Sandavági. Eisini aðrastaðni í landinum verður skipað fyri fótbóltsskúlum í summar.

Fyrsti fótbóltsskúlin í ár, varð hósdagin og fríggjadagin hildin i Sandavági. Seinni verða eisini fótbóltsskúlar suðuri i Vági, á Toftum og í Klaksvík. Í Havn verður eingin skúli.

Fyrireikararnir á fótbóltsskúlanum í Vágum láta at, at fótbóltsskúlin sum konsept er í kreppu, og ivasamt hevur verið, um hann yvirhøvur varð av nøkrum í summar. Illa hevur gingið á summum av størru plássunum at fáa leiðarar til skúlan, og í Havn er knívskorið.

Grundin er, verður sagt, at stóru feløgini fáa ikki fólk at taka sær av hesum vikuskiftinum, eftir at kappingin annars er farin í summarfrí.

Í Sandavági láta tey hinvegin at, at als eingin trupulleiki av slíkum slag er har, og tað sama siga tey seg hava frætt av Toftum. Tó verður sagt, at B68 hevur roynt at fingið samstarv við onnur feløg í Eysturoynni um skúlan, men teirri royndini kom einki burturúr, og tískil hava toftafólk átikið sær hetta einsamøll.

Men áhugin í Vágum er stórur, og tað eru ikki bara vágabørn, sum eru á fótbóltsskúla í Sandvági. Av teimum 92, sum við eru, eru umleið 20 av oynni.

Tað er SÍF, sum stendur fyri tí praktiska, men hava tey fingið ungar venjarar úr allari oynni at hjálpa sær, umframt at brasilski FSV leikarin, Silva, sum er ungdómsvenjari, hevur høvuðsábyrgdina av tiltakinum.

Og tey ætla at halda fram við hesum árliga tiltakinum, og eru longu farin at tosa um, hvussu gerast skal næsta ár, tí her skal fótbóltsskúlin ikki detta niðurfyri, siga tey í SÍF-húsinum.

Dentur verður lagdur á sosiala samveru og hugna fram um kappingar, og tað dámar børnunum sera væl. Luttakararnir eru børn í skúlaaldri.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 18 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 12 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 15 |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 15 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 14 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 27 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 13 |
| New York | 32 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1008 hPa við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum.




Lágtrýstið við Hetland fer eystureftir og lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Brúgvalagið haðani verður væntandi yvir Føroyum sunnukvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/06 kl. 06⁰⁰– 28/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 9,6°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 27/06 kl. 06⁰⁰– 28/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 72,6 mm

Brúðarlín
v/ Annika Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast

Radio-verkstaður
Umvæling av:
Sjónvarpum
Videotólum
Hi-Fi
Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki
Fokus ELEKTRONIK
Reynstún 19 · Argir
Tlf. 311306 - Fax 311306

## VESTFALLSKYRRINDI

19. juni: Mánin næstur jørðini
24. juni: Fullmáni
2. juli: Seinna kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. juni | 11.03 | 23.25 | 10.03 | 22.25 | 10.18 | 22.40 | 00.39 | 13.03 | 01.39 | 14.03 | 09.18 | 21.40 | 08.18 | 20.40 | 11.18 | 23.40 | — | 12.18 | 10.48 | 23.10 | — | 12.03 |
| 30. juni | 11.47 | — | 10.47 | 23.19 | 11.02 | 23.34 | 01.25 | 13.47 | 02.25 | 14.47 | 10.02 | 22.34 | 09.02 | 21.34 | — | 12.02 | 00.40 | 13.02 | 11.32 | — | 00.25 | 12.47 |
| 1. juli | 00.19 | 12.50 | 11.50 | — | — | 12.05 | 02.19 | 14.50 | 03.19 | 15.50 | 11.05 | 23.28 | 10.05 | 22.28 | 00.34 | 13.05 | 01.34 | 14.05 | 00.04 | 12.35 | 01.19 | 13.50 |
| 2. juli | 01.13 | 13.37 | 00.13 | 12.37 | 00.28 | 12.52 | 03.13 | 15.37 | 04.13 | 16.37 | 11.52 | — | 10.52 | 23.23 | 01.28 | 13.52 | 02.28 | 14.52 | 00.58 | 13.22 | 02.13 | 14.37 |

5 707265 100067 >